# CV

## STARVSROYNDIR

Dec. 2016 - nú: **Eigari av Prosa**, ein samskiftisfyritøka við altjóða samskifti sum serkunnleika.

Juli 2004 – dec. 2016: **Fríyrkis PR ráðgevi/umsetari/journalistur/redaktør.**

- Kundar hava fevnt um: Facebook, Wandsworth London Borough Council, Watford Council, West Dorset District Council, Tesco, Lidl, The Metropolitan Police Service, alt í Onglandi. Norðurlendskir kundar hava fevnt um danska uttanríkisráðið, Københavns Kommune, NNIT (Novo Nordisk IT), Københavns Universitet og universitetið í Oslo.

Mars 2015 - aug. 2016: **Sub-editor, Newsquest**, Weymouth, Dorset, Ongland.

- Eg arbeiddi í einum stórum sonevndum 'editorial production hub' í Weymouth, saman við 40 øðrum redaktørum, har eg redigeraði greinir og skrivaði kreativar yvirskriftir til avísir kring alt Bretland, men serliga lokalavísir í London.
- Eg fekk ofta at vita, at eg var millum tey allarbestu á kontórinum, hóast eg var tann einasti, sum ikki hevði enskt sum móðurmál.
- Eitt gott og avbjóðandi starv, men eg valdi at gevast og flyta heim aftur til Føroya, tí framtíðin hjá blaðídnaðinum í Bretlandi gerst daprari fyri hvønn dag.

Okt. 2011 - juni 2014: **Redaktør og samskipari**, ***ScienceNordic.com***, Keypmannahavn.

- ScienceNordic.com er eitt sonevnt 'webzine', sum varð sett á stovn í November 2011 fyri at kunna umheimin um norðurlendska gransking.
- Eg spældi ein avgerandi leiklut í hesi verkætlan frá byrjanini. Umframt at skriva, redigera og umseta danskar greinir til enskt, syrgdi eg fyri, at enska málbrúkið var rætt vinklað til ein altjóða lesaraskara. Hóast meginparturin av lesarunum vóru amerikanarar, so mátti eg alla tíðina hava í huga, at vit eisini høvdu lesarar í londum, har enskt ikki er móðurmálið. So har skuldi hvørt einasta orð vigast nakrar ferðir, áðrenn tað varð sent út á heimasíðuna.
- Hetta innibar eisini ta ótrúliga stóru diplomatisku avbjóðingina at sannføra skandinaviskar granskarar og journalistar um, at hóast teirra enska málbrúk sum heild var gott, so ljóðaði tað onkuntíð eitt sindur ov 'skandinaviskt'. Hetta var ikki altíð so lætt, men sera læruríkt, og hesar royndirnar hjálpa mær nógv í mínum núverandi virki við Prosa, tí avbjóðingin er tann sama her í Føroyum.
- Ein týðandi leiklutur var eisini at brúka sosialar miðlar – serliga Twitter, Reddit og Facebook – fyri at varpa ljós á okkara tíðindatilfar. Her mátti eg alla tíðina hava í huga, um vit skuldu vinkla tilfarið og málið til okkara stóra amerikanska lesaraskara, ella um vit skuldu hava tað meiri generelt til lesarar aðrastaðni í heiminum.

Apr. 2010 - okt. 2011: **Senior journalist, *The Copenhagen Post***, eitt vikublað og heimasíða við tíðindum til enskttalandi fólk í Keypmannahavn.

- Eg skrivaði tíðindagreinir um donsk viðurskifti, sum viðkomu útlendingum í Danmark. Eg var høvuðsjournalisturin, hóast eg

- var tann einasti á kontórinum, sum ikki hevði enskt sum móðurmál.
- Eg hevði dagligt samskifti við lesarar á Facebook og Twitter og fekk eitt tætt samband við hendan bólkin av 'dønum', sum kallast 'expats'.
- Líka sum við nógvum av hinum journalistastørvunum, eg havi havt, vaks lesaratalið hjá The Copenhagen Post munandi, so skjótt sum eg kom umborð. Kanska tað er tí, at eg havi arbeitt fyri nógvar ymiskar miðlar, sum hevur styrkt míni evnir til at seta meg inn í ymiskar málbólkar.

Jan. 2007 - Mars. 2008: **Journalistur, *VikuBlaðið***.

- Eg stóð fyri væl umtóktu greinarøðini 'Vikublaðið á ferð', har eg við penni, blokki og myndatóli ferðaðist kring landið og gjørdi frásøgnir um dagliga lívið, heilt frá Sumba til Hattarvíkar – og alt, sum harímillum liggur.
- Harumframt skrivaði eg tíðindagreinar til blaðið og heimasíðuna, og eg rættlas blaðið, áðrenn tað fór til prentingar.

Feb. 2006 - dec. 2006: **Editor, *European Baker*, *Asia Pacific Baker* and *Biscuit World***, Sevenoaks, Kent, Ongland.

- Eg tók mær einsamallur av øllum tí redaktiónella partinum av trimum vinnubløðum. Uppgávur fevndu um at skriva og redigera tíðindagreinir, røkja kundar og fyrisita fíggjarætlan og fríyrkisfólk.
- Ein stórur partur av greinunum vóru um tekniskar frágreiðingar innan vinnuligan bakstur, sum skuldu gerast lesaravinarligar. Her kom mín filosofiútbúgving væl við, tí har lærdi eg m.a. at lýsa torgreind hugtøk á ein einfaldan hátt.
- Eg varð 'headhuntaður' frá niðanfyristandandi starvi. Eg angraði skjótt avgerðina, tí ongin hevði sagt mær, at eg skuldi arbeiða einsamallur við trimum bløðum, so eg valdi at flyta heimaftur til Føroya eftir 9 mánaðir í starvinum.

Jan. 2005 - apr. 2006: **Deputy editor, *Heating and Plumbing Monthly***, Sevenoaks, Kent, Ongland.

- Eg skrivaði og redigeraði greinir, var ofta úti kring landið og úti í Europa og vitjaði verksmiðjur.
- Bara eg og redaktørurin vóru á redaktiónini, og hon arbeiddi bara hálva tíð. So eg fekk stóra ábyrgd frá fyrsta degi. Eins og við omanfyrinevnda starvi, var nógv av tilfarinum tungt og tekniskt, og skuldi skrivast á ein lesaravinarligan hátt. Ein stuttlig og gevandi avbjóðing.

Aug. 2004 - dec. 2004: **Trainee manager, IPG Imports**, London.

- Starvið snúði seg um at selja bamsur, gávulutir og ymsar dimsar á gøtunum í London, umframt at læra onnur at gera tað sama. Eitt løgið starv, men eg lærdi nógv um søluteknikkir.

Mars 2004 - juni 2004: Starvsvenjing hjá ***Men's Health*** and ***ICE* magazine**, London.

1996 -1997: Starvsvenjing hjá **Mogens Balslev Rådgivende Ingeniører**, Rødovre.

- Eg skrivaði og redigeraði enskar tekstir í marknaðarføringsdeildini (hálva tíð í 11 mánaðar sum partur av útbúgvingini á Niels Brock Handelshøjskole – sí niðanfyri).

## ÚTBÚGVINGAR

Sept. 2003 - juli 2004: **Postgraduate diploma í magazine journalism, Cardiff University.**

- Eg var tann fyrsti næmingurin nakrantíð, sum ikki hevði enskt sum móðurmál.

Sept. 1998 - juni 2002: **MA (Honours) í filosofi, Glasgow University.**

- Síðufak: Psykologi og antropologi.

1996 – 1997: Business communication, Niels Brock Handelhøjskole, Keypmannahavn, Danmark.

- Eg gavst eftir einum ári, tí eg vildi til Bretlands at lesa.

---

## ANNAÐ

**Mál:**

- Eg skrivi og tosi flótandi føroyskt, enskt og danskt.
- Norskt og svenskt skilji eg 100% og kann tí umseta úr hesum málum, men dugi ikki væl at skriva á teimum.
- Týskt, franskt, íslendskt og latín eru á einum lægri støði.

**Software:**

- Eg havi royndir við InDesign, Quark, Photoshop, MS Office, Knowledge, Dreamweaver, og ymiskum CMS'um. Eg havi brúkt sosialar miðlar í næstan øllum mínum størvum.